

**BJARNI ZISKA DAHL:**
- Nú havi eg fyri fyrstu ferð í nógv ár frí á norðoyastevnu, so tað ætli eg mær rættiliga at njóta. Eg havi annars spælt sjónleik ella luttikið í ítrótti, men í ár havi einki slíkt at hugsa um. Eg fari á listaframsýning og til onnur tiltøk, og annars fer tað bara at snúgva seg um at njóta stevnuna sum frægast.

# Rudolf skal fáa fólk at flenna

Ein av undangongumonnunum innan Norðoyastevnuteitið er nú komin aftur á slóðina. Rudolf Joensen stendur fyri teitinum í ár, og hann lovar



MYND: JENS KRISTIAN VANG

*Eyðun Klakstein*

– Sámal, eitt sindur meira frustererað, so er tað fínt.

Rudolf Joensen situr á fremstu røð í salinum í Atlantis, har Klaksvíkar Sjónleikarfelag venur Norðoyastevnuteitið. Gamli kenningurin í sjónleikarlívinum er komin aftur til Klaksvíkar við sjónleikarørindum, og hesaferð skal hann standa fyri at fáa eitt skemtiligt og undirhaldandi Norðoyastevnuteitið upp at standa.

Tað er hósdagur og ein lítil vika til fyrstu framførsluna. Sámal Eyðfinn og Agnas venja ein av leikunum, sum verður við í teitinum í ár.

– Skal eg koma longur inn á pallin, spyr Sámal Eyðfinn.

– Ja, um tú kemur longur inn á pallin, so komi eg ikki so langt handavegin, heldur Agnas.

Tey taka leikin ígjøgnum einaferð afturat, og tað gongur væl.

– Norðoyastevnuteitið verður ikki so persónligt og ágangandi í ár, sum tað onkuntíð hevur verið. Eg minnist, at eg var til teitið fyri nøkrum árum síðani, og eg helt, at tað fór í so illa við navngivnum persónum, sigur Rudolf Joensen.

– Tað er lætt at genera fólk, men eg haldi ikki, at tað riggar sum undirhald í teitinum, sigur hann.

**LÆTTARI FYRR**

Tá Sámal Eyðfinn og Agnas eru farin av pallinum, fara fýra genta á pallin at venja eitt dansishow. Rútmurnar eru nýmótans og stevið sannførandi. Tað er sjón fyri søgn, at tær hava vant dúgliga, áðrenn tær nú eru farnar á pallin í Atlantis at halda fram við venjingunum.

Adelborg Linklett, sum eins og Rudolf er millum drúgvu sjónleikarfólkini í Føroyum, gongur og ruddar í salinum. Og maðurin hennara, Kiss, hevur undirhildið við onkrum góðum søgum, áðrenn venjingarnar fóru í gongd.

Rudolf Joensen var millum leikararnar, tá tey fyrstu Norðoyastevnuteitinum vórðu spæld seinast í 70'unum og fyrst í 80'unum.

– Tá var tað nógv lættari at gera skemt við støði í fjølmiðlunum, tí øll hugdu eftir sama sjónvarpinum og lurtaðu eftir sama útvarpinum. Í dag er útboðið av sjónvarpsrásum so stórt, at tað næstan er vónleyst at gera gjøldur við onkrari sjónvarpssending, sigur Rudolf.

– Eg minnist, at vit eina árið gjørdu eina parodi upp á sendirøðina Dallas, sum allir føroyingar hugdu at. Vit kallaðu okkara útgávu Ballast, og broyttu vit røðina til føroysk viðurskifti. Tað var sera væl dámt, minnist Rudolf.

**EISINI LOKALT**

Rudolf Joensen sigur, at Norðoyastevnuteitið í ár verður meira hampuligt, enn tað hevur verið áður.

– Men vónandi verður tað bæði skemtiligt og undirhaldandi fyri tað. Býurin verður væl viðfarin, men okkurt lokalt man fara at stinga seg upp í afturvendandi túnatosinum ella onkrum av hinum leikunum, sigur hann.

Millum leikararnar í ár eru fleiri, sum hava drúgvar royndir á palli. Rudolf Joensen og Adelborg Linklett eru tvey teirra, men eisini fólk sum Suni Svabo Samuelsen, Bjarni Ziska Dahl, Jan Gardar og Øssur Hentze hava mangan staðið á palli áður.

Leikirnir eru skrivaðir av monnum sum Rudolf Joensen, Kára Øster, Mogens Højsted og Jógvan Eliasen.

Fyrsta sýningin av teitinum verður í kvøld klokkan 20.00, og síðani verður spælt alla norðoyastevnuna. Tvær sýningar eru hósdagin, fríggjadagin er eingin sýning, leygardagin og sunnudagin aftur tvær sýningar. Nær tær ymsu sýningarnar eru, sæst í skránni fyri stevnuna aðrastaðni í blaðnum.

# Nógvur tónleikur um stevnuna

Føroyski poppbólkurin Taxi skal spæla til stóra dansin í KÍ-høllini leygarkvøldið á norðoyastevnu. Dansurin byrjar, tá midnáttarsamkoman er liðug, hetta verður einar 20 minuttir eftir midnátt.

Kim Hansen er oddamaður í Taxi, sum gjørdust landskendir, tá teir vunnu Prix Føroyar kappingina í 1999. Bólkurin er mannaður við góðum og royndum tónleikarum, og teir spæla bæði egin løg og løg hjá øðrum.

Umframt Taxi verður nógv annað tónleikaundirhald á norðoyastevnu. Fríggjakvøldið spæla harmonikkuspælarar úr øllum Føroyum til gamlamannadans í KÍ-høllini. Aldursmarkið fyri hetta tiltakið er 20 ár.

**GOSPELKONSERT**

Diskotek verður í Lognbrá mikukvøldið, fríggjakvøldið, leygarkvøldið og sunnukvøldið. Øll kvøldini verður tað plátuvendari, sum skipar fyri tónleikaliga undirhaldinum.

Hóskvøldið verður stór gospelkonsert í KÍ-høllini. Hendan konsertin verður frá klokkan 21.00

Klaksvíkar klubbi hevur opið øll kvøldini á norðoyastevnu. Fríggjakvøldið og sunnukvøldið vendir Martin Kjærbo plátum, og leygarkvøldið fer bólkurin Fluffy-Toys at spæla til dans.

Tá ein tími er farin av sunnudegnum byrjar tónleikacafé í KFUM & K.

Og sum rosinan í pylsuendanum verður stór barna- og familjukonsert við Kulum Rótum í KÍ-høllini fríggjakvøldið klokkan 20.00



# Góða norðoyastevnu

Tann fyrsta av teimum stóru summarstevnunum verður hildin um vikuskiftið. Klaksvík er karmurin um norðoyastevnu, sum fer at bjóða alskyns tiltøk til allar aldursbólkar.

Í síðstu viku vóru ruddingardagar í Klaksvík, og í hesi vikuni hava fólk bæði privatfólk og fólk hjá Klaksvíkar kommunu fríðka um í býnum, soleiðis sum vanligt er at gera, tá norðoyastevnan er fyri durðum.

Norðoyar Frítíðar- og Ítróttarráð stendur fyri at samskipa norðoyastevnuna, og felagið ger á hvørjum ári nógv burtur úr at fáa eina góða og fjølbroytta skrá. Hetta er aftur eydnast í ár, har norðoyastevnan kann bjóða nógv forvitnislig tiltøk.

Norðoyastevnan verður í ár longri, enn hon vanligt er. Lagt verður fyri hósdagin, tá nógv tiltøk eru á skránni. Áður hevur verið vanligt, at stevnan er byrjað fríggjakvøld, men av tí at hódagurin er heiligdagur ber til at hava ymisk tiltøk.

Fyrstu tiltøkini verða tó longu í kvøld, tá Klaksvíkar Sjónleikarfelag fer at hava fyrstu framførsluna av Norðoyastevnuteitinum, sum leikarar úr felagnum hava vant seinastu dagarnar. Eisini verður dansur í Lognbrá frá midnátt.

Ítróttur eigur sum altíð ein sentralan leiklut á norðoyastevnu, og stóru tiltøkini eru sum vanligt FM-kappróðurin, sum verður leygardagin, og 1. deildardysturin, sum verður spældur sunnudagin. Hetta eru ítróttarhendingar, sum savna nógv fólk, men eisini nógvur annar ítróttur er. Millum annað verða nógvir fótbóltsdystir, bæði hjá teimum vaksnu og børnunum.

**NÓGV AT FARA TIL**

Men tað, sum nógv fólk gleða seg til, er sjálvur stevnuhýrurin, sum ger vikuskiftið so hátíðarligt. Fólk ganga og mæla í býnum, detta inn til familju og kenningar, fara til ymisk tiltøk og fáa annars tíðina at ganga við hugnaligum práti ymsastaðni. Onkur letur ein løgg niður í hálsin, onnur fara við børnunum í tivoli og onnur eru sjálvandi til arbeiðis. Men allastaðni er hýrurin góður, og er veðrið eisini til vildar, verður tað trupult hjá fólki at lata sum einki.

Hol verður sett á norðoyastevnuna i kvøld, men næstu dagarnar kemur meira ferð á hátíðardámin og tey ymsu tiltøkin. Við hesum serliga norðoyastevnublaði fara vit at ynskja øllum eina góða norðoyastevnu.

**Sosialurin**



**Seinastu tíðina hevur verið góðveður í Klaksvík, og nú vóna klaksvíkingar, at veðrið eisini fer at eydnast á norðoyastevnu um vikuskiftið. Mynd: Jens Kr. Vang**

